# KAPPAST Í AT ETA HOT WINGS

Tað verður kappast í bæði einum og øðrum, og nú um dagarnar var ein etikapping á skánni í Philadelphia. Wing Bowl kallast kappingin, har tað snýr seg um at eta flestar hot wings – kryddaðar høsnarungaveingir. Kappingin verður verið hildin 14 tey seinastu árini, og stórur áhugi er fyri at hyggja og fylgja við kappingini.

Luttakararnir fingu 30 minuttir til at eta í, og so ráddi um at finna rætta flogið

Joey »Jaws« Chesnut vann kappingina, og tað gjørdi hann, tí hann kláraði at eta 173 veingir innan 30 minuttir.

Nógv verður gjørt burtur úr undirhaldinum til Wing Bowl, og luttakararnir fáa góða hjálp frá lættkløddum kvinnum, sum heppa á teir.



Luttakararnir í Wing Bowl skuldu eta so nógvar høsnarungaveingir sum gjørligt innan 30 minuttir. Mynd: Scanpix



Vinnarin Joey Chesnut kláraði at eta 173 veingir Mynd: Scanpix

## LEDGER ROYNIR AT FJALA SEG



(Mynd: Scanpix)

Sjónleikarin Heath Ledger hevur ongantíð havt trupulleikar av paparazzi-myndamonnum – fyrr enn nú. Ledger byrjaði sum filmssjónleikari sum 13 ára gamla, men í ár hevur hann fingið sítt stórta gjøgnumbrot við filminum Brokeback Mountain. Hesin filmur er tilnevndur til fleiri Oscar-virðilsønir, og tað hevur gjørt Ledger meira áhugaverdan hjá bløðnum. Nú hevur Ledger selt sína íbúð við strongina í Sydney, tí har fær hann ikki frið fyri myndamonnum, sum liggja upp á lúr.

## WILL HELDUR SEG BURTUR



(Mynd: Scanpix)

Will Young orkar ikki fyri Brit Awards, og hann ætlaði sær ikki til tiltakið í ár. Men so hendi tað, sum kann henda fyri tann besta. Will Young var tilnevndur til eina virðisløn sum ársins sjónleikari.

– Eg hati virðislønarhandanir. Um eg ikki var noyddur at fara til tiltakið, so hevði eg ikki farið. Tað er eitt løgið tiltak. So nógv ego í sama høli. Eg eri sera fegin um at verða tilnevndur, men hatta er bara ikki eg, sigur Will Young.

## ANISTON FEKK AV AT VITA



(Mynd: Scanpix)

Angelina Jolie og Brad Pitt vóru fyri eini keðiligari hending á eini matstovu í Berlin herfyri. Ein fjeppari hjá Jenifer Aniston, sum Brad Pitt helt saman við í fleiri ár, kom inn á matstovuna í eini Vinir-troyggju og hevði beina kós ímóti Jolie og Pitt. Rópandi spurdi, hvar hjúnarbands-oyðileggjarin Angelina var. Tann illa kvinnan varð steðgað av lívverjunum hjá amerikansku sjónleikarunum, áðrenn hon fekk gjørt seg inn á tey.

